

## Laksaprísurin fallin

Sambært www.intrafish.no er laksaprísurin seinastu tíðina fallin nakað, men nú sær út til at marknaðurin stabiliserar seg beint oman fyri ásetta minstaprísin frá ES. Orsøkin til pressið á laksaprísin er árstíðin, og at tilgongdin av fiski til marknaðin er góð. Sjálvt um prísirnir á laksi eru í so lágir í løtuni verður ikki roknað við, at hann fer longur niður. Um summarið er vanligt, at marknaðurin er heldur trekur, meðan tilgongdin av fiski er stór. Roknað verður við, at prísirnir fara at hækka nakað seinni í ár (www.industry.fo)




*Nótaskipini og kraftblokkaskipini, sum herfyri góvust at fiska svarkjaft, eru nú farin at fiska sild, men enn hevur lítið verið at frætt um, hvussu gingist hevur*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Nótaskip farin

**Nótaskipini, sum herfyri í felag góvust við svartkjaftafiskiskapinum, hava nú loyst aftur. Skipini eru á sildaveiði norðarliga í íslenskum sjógvi. Tey flestu royna við nót, onnur eru farin at partrola, men sum summarið gongur, fara tey flestu helst at partrola, sum eisi-ni sparir teimum fyri ein part av oljuútreiðslunum**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri boðaði Felagið Nótaskip frá, at øll svartkjaftaskipini í felag fóru at gevast at fiska á midnátt, náttina til 22. mai. Orsøkin segðist vera, at oljuprísurin nú er vorðin so høgur, at skipini ikki fáa raksturin at hanga saman við tí svartkjaftafiskiskapi og prísi á ídnaðarfiski sum var.

Føroyska felagskvotan av svartkjafti í ár er 226.000 tons, og sambært nýggjastu uppgerðini hjá Fiskiveiðieftirlitinum eru umleið 15.000 tons eftir av hesi kvotu.

- Fiskiskapurin eftir svartkjafti er ikki lønandi longur. Seinasta árið er oljuprísurin hækkaður við meira enn tveimum krónum fyri litur-in. Eitt miðal nótaskip brúkar 4 miljónir litrar av olju um árið, og soleiðis svarar hækkingin í oljuni til eina eykaútreiðslu upp á einar 8 miljónir krónur um árið.

Felagið Nótaskip vísti á, at samstundis, sum oljuprísurin er hækkaður, og fiskiskapurin er minkaður, er avreiðingarprísurin á svartkjafti lækkaður við einum triðingi í eitt ár.

Í fjør var miðal avreiðingarprísurin 1,25 krónur fyri kilo, men tá skipini í felag góvust at fiska, var avreiðingarprísurin bert 85 oyru fyri kilo.

- Hetta hevur við sær, at er fiskiskapurin ikki góður, er ikki lønandi at fiska svartkjaft til ídnað, segði felagið.

### Farin útaftur

Í samrøðu við Rás2 segði Jógvan Jespersen, stjóri í Felagnum Nótaskip, at fiskiskapurin eftir sild og makreli plagar at taka seg upp í juni, og at støða verður tikin til, um loysast skal aftur, tá hendan tíðin kemur.

Nú eru so nótaskipini og kraftblokkaskipini farin útaftur at royna, og hesaferð eru tey farin at royna eftir sild.

Í morgun hevur verið trupult at fingið fatur á fólki, sum vita at siga, hvar skipini eru, og hvussu gingist hevur hesar fyrstu dagarnar.

Vit royndu at fáa fatur á Kristian Martini Rasmussen, reiðara í Klaksvík og Jákupi Jacobsen, reiðara í Gøtu, men hvørgin var at hitta.

Jógvan Jespersen, stjóri í Felagnum Nótaskip, sigur, at honum kunnugt eru skipini nú farin á sild, men hann sigur seg ikki vita nakað um royndina higartil at siga.

Nú skipini hava loyst aftur, spurdu vit stjóran, um tiltakið hjá svartkjaftaskipunum at leggja í felag var ein roynd at trýsta prísin á ídnaðarfiski upp.

- Nei, tað var tað ikki. Hetta var bara ein staðfesting av, at tað loysti seg ikki hjá skipunum at fiska. Raksturin hekk ikki saman við hækkaðu oljuprísunum, vánaligum svartkjaftafiskiskapi og lækkaðum avreiðingarprísi.

Hann vísir á, at tá raksturin gerst dýrari, samstundis sum avreiðingarprísurin er lækkaður, er neyðugt at fis-